# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**BILLARD FM**

*Tíðindaskriv*

# Hallur Joensen føroyameistari í billard

## Hann kom, sá og sigraði




*Hallur Joensen, nýggjur føroyameistari í billard.*

Er tað ein, sum livur upp til hugtakið ”Hann kom, sá og sigraði”, so er tað klaksvíkingurin Hallur Joensen. Fyrsta árið hann hevur luttikið í eini føroyameistarakapping í billard eydnaðist tað hesum billardkappanum at vinna á øllum øðrum og spæla seg fram til høgt mettu finaluna, sum hann vann.

Vikuna frammanundan staklinga-FM eydnaðist tað Halli og Allan Larsen úr Klaksvíkar Billardfelag at vinna bronsu í liðkappingini. Seinasta vikuskifti kom túrurin til FM fyri einstaklingar. Og sum vera man varð nýggja billardstjørnan úr Klaksvík alspent. Hetta var fyrstu ferð hann skuldi royna seg í eini slíkari kapping ímóti fleiri av teimum bestu í billard.

Endin gjørdist, at føroyskt billard fekk ein spildur- og flunkandi nýggjan føroyameistara seinasta leygardag. Hallur Joensen vann í finaluni á tí roynda og góða Kristian Suna Høgnesen, eisini úr Klaksvíkar Billardfelag. Dysturin var javnur frá byrjan men skjótt dragnaði Kristian Sune afturúr, meðan Hallur vísti gott, javnt og stabilt spæl. Hann fekk kúlurnar at rulla tó at tað ikki gjørdist nakar marathondystur. Móti endanum gjørdi Kristian Sune ein ordiligan vørr, sum hann er so kendur og ”beryktaður” fyri. Eingin dystur er lætt vunnin móti Kristian Suna og eingin hevur vunnið á honum fyrr enn hann hevur spælt seinasta stoyt. Við einum umfari uppá 146 eygu hálaði hann væl inn á Hall, sum tó ikki lat seg forskrekkja av hesum endaspurtinum hjá liðfelaganum. Hetta stóra umfarið, sum minkaði um munin teirra millum, tók ikki ”pippið” frá Halli. Hann fór sikkur aftur til borðið og koppaði tær seinastu keylirnar í spælinum. Spælið endaði við sigri til Hall, sum fekk 576 eygu, meðan Kristian Sune fekk 502 eygu. Dysturin var sjálvandi sermerktur av nervum, og tí blivu tølini ikki tey metstóru. Kristian Sune og Hallur høvdu spøl uppá 1062 og 844 eygu í innleiðandi umfarinum.

### Niels stóð seg væl

Undan finaluni var dystur um 3. plássið millum Sonhard Johannessen og Niels Nielsen. Her var Niels tann stinnari og eftir at hava spælt sera væl í innleiðandi umfarinum við m.a. at vinna á Kristian Suna tapti Niels tó tepurt í semifinaluni móti Halli. Men hann vann sannførandi á Sonhard í dystinum um 3. Plássið. Hetta er annað árið á rað, at Niels vinnur bronsu til FM. Eingin ivi er um, at Niels, sum er sonur fyrrverandi stórspælaran í føroyskum billard, Eirik Nielsen, fer at røkka longur, um hann ger meira við venjingina.

Tað var sjálvandi eitt sindur spell fyri billarddygdina, at tveir av bestu spælarunum ikki vóru við í ár, fyrrverandi føroyameistararnir Hendrik Petersen og Bjarni Skaalum. Teir skulu kortini ikki kenna seg ov tryggar, um teir ætla at vera við til komandi FM, tí bæði Hallur Joensen og Kristian Sune er sera væl koyrandi. Og tað síggja vit m.a. á meðaltølunum í FM kappingini.

Nýggi føroyameitarin Hallur Joensen hevði 27,9 eygu í meðal, nr. 2 Kristian Sune Høgnesen hevði 31,28 eygu í meðal, nr. 3 Niels Nielsen hevði 20,28 eygu og nr. 4 Sonhard Johannessen hevði 23,12 eygu.

Sigast kann tí at henda kappingin var á høgum støði við trimum klaksvíkingum millum fýra teir bestu. Enn einaferð eitt sera flott úrslit fyri billardítróttina í Klaksvík. Tá skulu vit heldur ikki gloyma, at Klaksvíkar Billardfelag vann bæði gull og bronsu í liðkappingini. Hetta billardárið er komið at enda, men tá oktober nærkast verða køirnar aftur tiknar fram. Tá byrjar nýggja billardárið við stóru og søguligu Haldor Holm kappingini, har 8 teir bestu luttaka. Nú fáa vit so at síggja, um Hallur Joensen eisini tá ætlar sær at vinna ta kappingina fyri fyrstu ferð. Tað er ikki heilt ósannlíkt, men hann fer at fáa harða mótstøðu, eingin ivi um tað. Liðkappingin endaði annars við gulli til Klaksvíkar Billardfelag, silvuri til Mim og bronsu til Klaksvíkar Billardfelag.

### Borgarstjórin vitjaði

Klaksvíkar Billardfelag hevur vunnið heimbýnum so nógv steyp og gullmerki, at Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri eftir kappingina leygardagin í Klaksvíkar Klubba vildi vísa spælarunum og vinnarunum tann heiður at støkka inn á gólvið. Tað gjørdi hann við manér, tí í hondini hevði

*farmhald á síður 32*